## Dagføra fótbóltsvøllin

**Klaksvík:** Nú skal alt gerast fyri at fótbóltsvøllurin og kringumstøðurnar við Djúpumýru lúka altjóða krøv.

Tí eru nú sett upp nýggj skýli við beinkjum til skiftisleikararnar í sambandi við fótbóltsdystir í Klaksvík.

Hetta eru skýlið til íalt 13 persónar, ið eru bygd eftir teim fyriskipanum hjá UEFA, ið setir minstukrøv til vallir og ítróttarøki ídag. Í Føroyum er tað Fótbóltssambandið ið umsitir hesar fyriskipanir.

Í farnu viku arbeiddu menn frá vegadeildini í kommununi við at leggja hall á, umframt at leggja graslíki á heilt inn undir beinkirnar, soleiðis at vøllurin verður í einum, heilt út í skýlini, skrivar heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu.

**sb.**



*Nú eru skýli sett upp við fótbóltsvøllin í Klaksvík*

## Planeringin byrjar

**Havn:** Nú kunnu tey, sum eiga tey 300 fermetra stóru grundøkini í Hoyvíkshaganum suður, søkja um at sleppa at planera.

Áðrenn tey sleppa tað, eru nakrar treytir, ið skulu lúkast. Umframt sjálva umsóknina skal eisini latast inn ein planeringstekning við øllum neyðugum upplýsingum.

- Byggisamtakið, J&K Petersen ger planeringsarbeiðið, um hetta skal gerast áðrenn útstykkingin er liðug. Hetta er tí, at einki annað felag sleppur inn á byggiøkið fyrr enn alt er avhandað, verður upplýst.

**sb.**

## Gera klárt til stevnu

**Runavík:** Eitt, sum serliga kappróðrarfólk síggja fram til, eru tær mongu summarstevnurnar kring landið.

Hesar verða hildnar á mongum ymiskum støðum, og nú eru tey í Runavík og bygdunum nærhendis eisini til reiðar at fara undir fyrireikingar av ársins stevnu.

Eystanstevnan 2005 verður hildin vikuskiftið 10. til 12. juni. Til tað eru minni enn tveir mánaðir eftir, so at tey sum gleða seg til hesa stevnuna, tørva ikki at bíða so leingi aftrat.

**sb.**

## Um 800 fólk á konsert

**Eiði:** Um vikuskiftið var ítróttarhøllin á Eiði karmur um tvær sera ymiskar konsertir sama kvøld.

Leygarkvøldið var fyrst høvi at fara til eina kórkonsert, har trý ymisk kór luttóku, og seinni um kvøldið var høvi at fara til eina konsert við fleiri ymiskum bólkum.

Við ta fyrru konsertina vórðu seld umleið 400 atgongumerki, og til ta seinnu konsertina vórðu seld nøkurlunda sama tal av atgongumerkjum. Innkomni peningurin fer allur til eina missiónsferð til Kina í summar.

Tey, ið ikki høvdu møguleika at sleppa til ta fyrru konsertina, kunnu bara hyggja í skránna hjá Sjónvarpi Føroya, tí hon varð nevniliga tikin upp á band, og verður send seinni.

**sb.**

# – Hesa ferð steðgi eg stutt

**Jósvein Østerø úr Klaksvík var við Barsskor hósdagin í farnu viku. Hann hevði eitt arbeiði, hann skuldi gera í Mikladali, men ætlaði sær innaftur fríggjakvøldið. - Barsskor er eitt gott skip, sigur hann**

SAMFERÐSLA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*- Hesaferð steðgi eg ikki so leingi. Eg fari inn aftur í annaðkvøld, sigur Jósvein Østerø*

*- Mynd: Bárður Lydersen*

**Mikladalur-Klaksvík:** Leið 56 millum Klaksvík og Kalsoynna er ikki til longur.

Í dag byrjar eitt nýtt tíðarskeið fyri samferðsluna í Kalsoynni, nú strandfaraskipið Sam fer at røkja hesa rutuna í framtíðini.

Við fleiri fráferðum dagliga er nú gjørligt hjá kalsoyingum at sleppa bæði til Klaksvíkar og somuleiðis beinleiðis inn á meginlandið sum ferðafólk - og eisini sum bilførarar í egnum bili.

Ein teirra, sum hevur verið mangan túrin við tí 76 ára gamla Barsskor, sum nú er lagdur, er Jósvein Østerø úr Klaksvík.

Hann hevur havt manga góða ferðina við Barsskor til Kalsoynna, og fór enn eina slíka ferð hósdagin í farnu viku.

Hesaferð fór hann ikki sum ferðandi, men sum arbeiðsmaður, tí hann hevði eitt arbeiði at gera í oynni.

- Jú, Barsskor hevur verið eitt deiligt skip. Men tað er líkasum at tíðin er farin frá honum, sigur Jósvein.

## Neyðug umvæling

Hósdagin í farnu viku fór Jósvein norður til Mikladals, har hann hevur eitt arbeiði at gera.

Hóast henda bygdin ikki telist millum tær størstu í landinum, so hevur fólkið í bygdini kortini megnað at tikið eitt stórt tak við at byggja og reka fráhaldshúsið í Mikladali.

Tað er Mikladals Sóknar Fráhaldsfelag sum eigur hetta húsið. Tað verður brúkt til mong ymisk endamál, bæði hjá felagnum sjálvum og til útleigan til samkomur av ymiskum slagi.

Men eitt slíkt hús slítist eisini av tíðarinnar tonn og av nýtslu, og tí er neyðugt við millumbilum at gera ábøtur á tað og skifta út tað, ið er farið.

Tað var júst í hesum ørindum at Jósvein fór til Mikladals henda seinnapartin hósdagin í farnu viku.

Tíðin var komin til, at gera onkrar ábøtur á hetta stóra húsið, nú summarið og ferðafólkini standa fyri framman.

Óhugsandi er ikki, at rift verður um hetta húsið í summar, nú ferðasambandið er blivið so gott við meginlandið, eftir at Sam er settur í sigling millum Syðradal, Klaksvík og Leirvík í dag.

## Klárt til summarið

Hetta húsið hjá fráhaldsfelagnum er rættiliga væl útgjørt til legur og tílík endamál, men tað krevur so hinvegin, at tey eisini verða hildin viðlíka.

- Í dag verður helst til tað, at eg fari at bróta kaminuna í húsinum niður. Tað verður tað fyrsta, sum eg fari í holt við, sigur Jósvein Østerø, nú vit fáa orð á hann á dekkinum umborð á Barsskor.

Hetta er bara fyrri parturin av einum heldur størri arbeiði. Næsta stigið er at flyta ein ketil, sum hevur likið í eina tíð.

- Hann hevur likið, og úrslitið av hesum hevur verið, at undirsløg og annað eru rotnað. So nú fara vit at flyta kaminuna útum, sigur Jósvein, sum hugaligur ætlar sær undir hetta arbeiðið.

Og hann veit sum er, at við einum slíkum arbeiði fylgja mong onnur smærri arbeiði. Men tey verða gjørd so hvørt.

- Tað er neyðugt at húsið er í góðum standi, til summargestirnir byrja at koma, sigur Jósvein, sum kann átaka sær vanligt fyrifallandi arbeiði innan timbur, rør og jarn.

## Eitt gott fartoy

Jósvein hevur sjálvur ferðast mangar ferðir við hesi farleiðini. Og hann sigur tað sama sum so mong onnur: Barsskor hevur verið eitt deiligt skip.

- Skipið er vælegnað at sigla um fjørðin við, eisini tá hann fyrr kom norður til Trøllanesar. Har var mangan brim og ikki altíð var so gott veður - men Barsskor var eitt gott fartoy, eisini til slík støð.

Hinvegin so dugir Jósvein eisini at síggja, at tíðin er farin frá Barsskor til hesa siglingina, tí onnur krøv verða sett til slíkan flutning ídag.

Hann er ein teirra, sum hevur havt nógvar góðar túrar við Barsskor.

Serliga minnist hann aftur á tann serstaka hugnan tað var, tá nógv fólk vóru samankomin og prátið gekk millum ferðafólkini.

Men nú er henda siglingin hjá Barsskor søga. Og nú skal so finnast ein annar hugni umborð á Sam.

## Ferðafólk

Jósvein er væl kendur í Mikladali, og er somuleiðis væl kendur innanveggja í húsunum hjá Mikladals Sóknar Fráhaldsfelagi.

Eitt árið herfyri skipaðu Jósvein og konan soleiðis fyri at hetta húsið var opið fyri teim ferðandi, og har fólk bæði kundu fáa sær ein bita at eta og gista.

- Har kom nógv fólk, skal eg siga tær. Og tað kom eisini fyri, at fólk ynsktu at gista har.

- Eg fari so ikki at hava opið har í summar. Men um tað kann blíva til nakað seinni, - tja, tað veit eg ikki, sigur Jósvein at enda.

Vit hava staðið og prátað á dekkinum umborð á Barsskor, og áðrenn vit reiðiliga sansa tað, minkar motorurin ferðina, tí nú eru vit komin til Húsar.

Jósvein hevur okkurt viðføri og nakað av amboðum við sær í land, og so fer hann til bussin, ið skal føra hann norður til Mikladals.

- Hesaferð verður steðgurin ikki so langur. Tí eg ætli mær innaftur í annaðkvøld, sigur hann.




*Jósvein hevur havt mangar góðar túrar við Barsskor. - Hann er eitt gott skip, sigur hann, meðan hann rindar fyri enn ein ferðaseðil*

*Mynd: Bárður Lydersen*

## Ein túrur við Barsskor

Sosialurin var við Barsskor hósdagin í farnu viku, tá hann legði frá landi í Klaksvík kl. 13:20.

Við vóru ikki nógv ferðafólk - einans tvey, umframt umboðini fyri blaðið. Vit hava áður tosað við skiparan umborð, Sigmar Høgnesen og við tað eina ferðafólkið, Johannu Mariu Isaksen.

Lesið samrøðurnar við hesi bæði í Sosialinum nr. 72 og nr. 73.